# ítróttur

Nr. 117 • hósdagur • 23. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# 40 sparkivallir kring landið

**UEFA hevur givið føroyskum fótbólti tilsøgn um 4,7 mió stuðulskrónur til 40 sparkivallir kring landið**

SPARKIVALLIR
*Jákup Mørk*

Seinnu árini hevur UEFA í fleiri umførum latið stuðul úr HatTrick-grunninum, sum hevur til endamáls at menna græsrøturnar innan fótbóltin.

Ein partur av hesum hevur verið ein verkætlan, har roynt hevur verið at fáa fótbóltsspælið á smáu vallunum í fokus aftur. Ein partur av fótbóltsspælinum, sum gjøgnum tíðirnar hevur ment hópin av evnaríkum spælarum, men sum við tættbygdu býarmyndunum runt alt Europa er skumpaður alt meira frá fólkinum.



*Á Hamrinum á Argjum hevur børunum dámað væl at sparka á nýggja vøllinum. Næstu árini skulu ætlandi koma 40 vallir av sama slag kring landið*

## 10 vallir koma í ár

Eisini Fótbóltssambandið hevur sýnt áhuga fyri verkætlanini, og í fjør heyst varð ein royndarverkætlan gjørd á Hamrinum á Argjum. Hendan hevur bæði riggað væl og verið serstakliga væl umtókt. Somikið væl, at FSF hevur arbeitt víðari við ætlanini, og nú hevur UEFA altso givið grønt ljós.

Samlaða stuðulsupphæddin frá UEFA er 4,7 mió kr., og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur, at hetta helst kann røkka til einar 40 vallir kring landið.

- Vit hava valt at handfara málið soleiðis, at vit hava gjørt avtalu við ein útlendskan veitara av graslíki. Er talan um standardstøddina, 13X21 metrar, so syrgja vit fyri graslíkinum og álegging. Hartil veita vit gyrðingar, mál v.m., sum hoyra vøllinum til.

Fótbóltssambandið hevur longu gjørt av, hvar teir fyrstu 10 vallirnir fara. Fyrstu fimm verkætlanirnar verða væntandi útlagdar í august mánaði, og eru hesar í Havn, Leirvík, Sunda Kommunu, Sørvági og á Toftum. Í øðrum, sum vónandi verður lagt út seinni í ár, er stuðul játtaður til Miðvágs, Sjóvar, Eiðis, Skúvoyar og Viðareiðis Kommunu.

Verkætlanin skal ætlandi ganga fram til 2008, og skulu Føroyar tá hava 40 slíkar sparkivallir.

## Ikki bara komunalt

Sum skilst, so er tó ikki nøkur treyt, at talan er um kommunur, sum søkja um stuðul til verkætlanir. Tað er t.d. væl hugsandi, at okkurt eigarafelag eisini kann standa fyri eini slíkari verkætlan. Er økið planerað og annars klárt at taka í nýtslu, so kemur FSF við undirlagi og álegging, umframt at stuðul eisini verður veittur til kringstøðurnar. Og verður talan tá um sjálvboðið arbeiði, sum verður gjørt á t.d. einum fríøki, so nýtist tað ikki at kosta eigarafelagnum nógvar krónur, áðrenn ein líðugur sparkivøllur er veruleiki.

# Nýtt búmerki til skála

BÚMERKI
*Tíðindaskriv*

Skála Ítróttarfelag hevur nú fingið sær nýtt búmerki. Á seinasta aðalfundi samtykti nevndin, at nýtt búmerki skuldi fáast til vega. Einamest tí felagið nú bara fæst við fótbólt, og at gamla búmerkið tí var ótíðarhóskandi.

Ein búmerkjakapping varð útskrivað, og hóast stutta skotbráðið, hevur nevndin síðani fingið eini 30 uppskot at meta um. Eftir viðgerð av innkomnu uppskotunum kom nevndin ásamt um at velja omanfyristandandi uppskot, sum Guðrun Christiansen, ið er ættað av Strondum men búsitandi í Danmark, er meistari fyri.

Grundgevingin hjá starvsnevndini at velja uppskot Guðrunar er, at talan er um eitt einfalt búmerki, har Skála er á ferð frameftir og uppeftir. Eisini eru fáir litir í hesum uppskotinum og tað ger tað einfaldari at arbeiða við grafiskt. Litirnir í búmerkinum kunnu skifta, alt eftir hvør bakgrundin er, og tað ger tað lætt at arbeiða við.

SKÁLA 1965

*Tað er Guðrun Christiansen, sum hevur teknað nýggja búmerkið hjá Skála Ítróttarfelag*

# Ynskja samstarv um høllina

**Fótbóltssambandið vil hava teir báðar verkætlanarnarból karnar í Eysturoynni at tosa um møguleikan fyri samstarvi um eina fótbóltshøll**

FÓTBÓLTSHØLL
*Jákup Mørk*

Fótbóltssambandið hevur nú á fundi viðgjørt umsóknirnar, sum vóru komnar inn um fyrstu føroysku fótbóltshøllina.

Trý uppskot vóru innkomin, men í eftir viðgerðina hevur FSF í fyrsta umfari valt at síggja burtur frá uppskotinum hjá Havnar Timburhandli, sum ikki ítøkiliga segði, hvar ein slík skuldi byggjast, ella hvussu bygging og rakstur av hesari skuldi fíggjast.

Tað vil so siga, at støða nú skal takast til, um talan skal verða um høll á Svangaskarði ella í Skálabotni, men í fyrsta umfari hevur FSF ikki gjørt sær nakra niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF, sigur, at tey í fyrstu atløgu hava roynt at fáa partarnar aftan fyri tey bæði uppskotini at tosa saman.

- Áðrenn vit eru farin víðari í okkara arbeiði, hava vit valt at biðja partarnar um at kanna samstarvsmøguleikarnar, sum kunnu liggja í hesum. Um tað er gjørligt, so halda vit tað vera betri, um talan verður um høll, sum hevur so breiðan uppbakning sum gjørligt, og sum ikki skal síggjast sum kapping millum øki ella bólkar, sigur Ísak Mikladal.

Enn er ikki greitt, nær FSF ella innblandaðu partarnir fara at arbeiða víðari við málinum, men meira verður helst at frætta um hetta í næstum.